# Færri íslendingar roykja

Talið á roykjarum í Íslandi hevur ongantíð verið so lítið sum nú samanborið við fólkatalið. Ein nýggj kanning, sum heilsuverkið hevur skipað fyri, vísir, at 15 prosent av øllum íslendingum millum 15 og 89 ár festa sær í hvønn dag. Talið er minkað støðugt síðani 1991, tá 30 prosent royktu hvønn dag. Hendan gongdin helt fram í fjør, tí hagtøl vísa, at íslendingar keyptu færri sigarettir í fjør enn árið fyri, skrivar Vísir. Tá Altingið í 2001 samtykti eina 10 ára ætlan var málið, at í 2010 skuldu færri enn 15 prosent av teimum vaksnu roykja hvønn dag, og hetta mál er rokkið, skrivar blaðið.



# Grønlendskt hótt mál

ST-stovnurin UNESCO sigur í einari nýggjari frágreiðing, at um 100 ár verða bara 10 prosent av heimsins tungumálum eftir. Eitt nú verður sagt, at eystur- og norðurgrønlendskt eru í stórum vanda, meðan tað vesturgrønlendska málið stendur heldur sterkari. Málfrøðingurin Peter Bakker sigur við grønlendska kringvarpið, at UNESCO hevur savnað upplýsingar um øll tey 2.400 tungumálini, sum eru í vanda fyri at doyggja út. Hann sigur, at hetta arbeiðið hevur stóran týdning, tí máldeyði gevur sosialar trupulleikar og flr fólk at gloyma teirra samleika.

# granskarar á Suðurpólinum





*Pingvinir eru ein sjáldsom sjón, tí tær finnast bert á Suðurpólinum. Hetta er ein forkunnug ferð hjá manningini við Mary Arctica*

- Vit hava skilt, at tey stundum koyra í eini tvey samdøgur inneftir ísinum.

Høgni sigur, at teir hava eisini ein lastbil við til Suðurpólin, sum granskararnir skulu gera seismikkanningar við.

- Hetta er ikki ein bilur, sum skal bora niður í ísin, men ein, sum ”slær” niður á ísin, og soleiðis máta teir ristingar og kunnu staðfesta, hvussu tjúkkur ísurin er.

Tá Rás2 tosaði við skiparan, segði hann, at manningin við Mary Arctica sum so einki samband hevði við granskararnar. Hann væntaði, at teir fóru at taka upp samband við fólk á støðunum, tá skipið nærkaðist.

- Vit skulu á trý pláss á Suðurpólinum. Fyrst støðin er belgisk, onnur týsk, og hon triðja er norsk. Allir umborð eru sera spentir til uppgávurnar, sum liggja fyri framman, sigur hann.

### Blindur ferðamaður

Mary Arctica fór úr Kape Town hósdagin hin 17. desember.

- Áðrenn vit fara úr slíkum havnum, verður landgongdin tikin upp, og vit hyggja alt skipið væl og virðiliga ígjøgnum fyri at vita, um nakar óboðin gestur er umborð. Tað gjørdu vit eisini hesaferð. Vit leitaðu um alt skipið og sóu ikki annað enn, at alt var, sum tað skuldi.

Men antin høvdu Høgni og hansara menn ikki leitað nóg væl – ella hevði ein ungur, svartur maður dugað ógvuliga væl at krógvað seg.

- Sunnumorgunin eftir, tá vit høvdu siglt í trý samdøgur, sóu vit, at ein óboðin ”gestur” var umborð.

Høgni Petersen sigur, at hendan morgunin ”dukkar” ein ungur maður upp.

- Hann hevði einki uppi á sær av nøkrum, hvørki pappírir ella nakað. Ungi maðurin hevði bara tey klæði, hann var í.

Yvirstýrimaðurin heldur, at tað var gott, at maðurin kom undan kavi tá, tí annars hevði hann helst doyð í kulda.

- Nú noyðist hann at vera umborð hjá okkum í langa tíð, tí túrurin er roknaður til tveir mánaðir. Maðurin hevur tað gott umborð hjá okkum, men hann sleppur ikki at ganga leysur. Hann er innilæstur á einum kamari, men fær at eta, tá vit eta. Tá verður matur borin niður til hansara. Hann sleppur út á dekkið av og á saman við onkrum av manningini, og so noyðist hann innaftur í kamarið. Tá hann skal á wc, ringir hann upp á brúnna, og so fer maður niður til hansara. Annars royna vit at brúsa honum annan hvønn dag.

### Ein skelkur

Høgni Petersen sigur, at ungi drongurin, sum annars er úr Tanzania, hevði væntað at komið til Evropa ella USA, tá hann snýkti seg og krógvaði seg umborð á skipinum.

- Hann helt, at Mary Arctica kanska skein eitt sindur meiri enn onnur skip, sum lógu í havnini, og tí valdi hann helst at snýkja seg umborð hjá okkum. Nú hann hevur sæð øll ísfjøllini, sum vit eru umgyrdir av, hevur hann helst fingið ein skelk, tí tað var ikki hetta, hann ætlaði sær.

Hann vísir á, at drongurin hevur fingið skógvar og klæði, og tá teir koma til lands aftur, fer hann hagar, hann er komin.

- Sjálvandi er tað keðiligt fyri hann at sita á kamarinum, men hann kundi tað sama verið deyður í kulda, endurtekur yvirstýrimaðurin.

Ætlandi skuldi Mary Arctica vera hjá fyrstu støðini á Suðurpólinum jólaaftan og byrja at lossa tíðliga 1. jólamorgun.

- Tann sosiali parturin virkar væl umborð hjá okkum, og vit hava bæði klipt jólapynt og hava pyntað jólatræ. Døgurðin verður helst danskur við fleskasteik og dunnu og øllum tí, sum hoyrir til, men kanska fara eg og Símun Pætur at gera okkara part av jólunum eitt sindur føroysk. Eitt nú fara vit at pakka jólagávurnar upp saman.

Manningin á Mary Arctica hevur fingið jólagávur úr Danmark, og reiðaríið hevur eisini givið teimum gávur. Haraftrat hevur onkur jólagávur heimanífrá.

- Vit hava eisini keypt eina gávu í part og fara soleiðis at spæla ”pakkaspæl” á jólum, segði Høgni Petersen, skipari, í áhugaverdu samrøðuni við Rás2 beint undan jólum.

Sosialurin fer ætlandi at venda aftur til Høgna Petersen og spyrja, hvussu gekst á Suðurpólinum, tá ein tíð er umliðin.

Í sambandi við samrøðuna fyri jól, hevur yvirstýrimaðurin nú sent okkum nakrar myndir, sum teir hava tikið, tá teir komu uppat ísbrúnni, og soleiðis prenta vit onkra av hesum myndum í dag.